Skráseting Føroya

**Frágreiðing viðvíkjandi roknskapareftirliti av innkomnum ársfrásagnum í 2023**

Frágreiðingin viðgerð úrslitið av roknskapareftirlitinum av innkomnum ársfrásagnum í 2023.

Tann 31. desember 2022 vóru 4084 feløg skrásett í partafelagsskránni hjá Skráseting Føroya. 42% av feløgunum høvdu grannskoðara skrásettan, meðan 58% vóru skrásett uttan grannskoðara.

Skráseting Føroya ger hvørt ár eftirlit við ársfrásagnunum hjá skrásettu feløgunum. Árliga roknskapareftirlitið er býtt í tvey. Eitt móttøkueftirlit, ið hevur til endamáls at lúka mest sjónligu feilirnar burtur, og síðani stakroyndir samsvarandi § 159 í ársroknskaparlógini, sum er ein gjølla gjøgnumgongd av útvaldum ársfrásagnum.

Endamálið við roknskapareftirlitinum hjá Skráseting Føroya er fyrst og fremst at tryggja, at tær ársfrásagnir, sum feløg senda inn, eru rættar. Harumframt verður kannað um aðrir upplýsingar, sum felagið hevur fráboðað til Skráseting Føroya samsvara við ársfrásøgn felagsins. Tað vil siga viðtøkur, fráboðan um eigarar, grannskoðaraviðurskiftir og hvussu felagið annars er skrásett í partafelagsskránni.

**Úrslit frá stakroyndunum samsvarandi § 159 í ársroknskaparlógini:**

Í 2023/2024 vóru 52 ársfrásagnir frá roknskaparárinum 2022 kannaðar sum stakroyndir. Harav 26 við grannskoðara skrásettum í skipanini hjá Skráseting Føroya og 26 uttan grannskoðara skrásettan í skipanini hjá Skráseting Føroya. Hetta var áleið 1,3% av samlaðu feløgunum.
Av teimum 26 feløgunum, sum høvdu valt grannskoðan frá, høvdu 19 fingið hjálp frá grannskoðara at seta roknskapin upp.

Niðanfyri standandi talva vísir býtið av viðurskiftum sum Skráseting Føroya hevði viðmerkingar til í fimm bólkar:

| **Viðurskifti** | **Ársfrásagnir** |
|---|---|
| **1. Nýttur roknskaparháttur** | **6** |
| **2. Forklárandi notur** | **4** |
| **3. Manglandi partar av ársfrásøgnini** | **4** |
| **4. Fráboðan til Skráseting Føroya manglar** | **8** |
| **5. Partaeigaralán** | **5** |

Skráseting Føroya · Sigmundargøta 13 · Boks 264 110 Tórshavn · Tlf.: +298 356010 · E-mail: skr@skraseting.fo

**Nýttur roknskaparháttur** – Sambært ársroknskaparlógini skulu ársfrásagnir millum annað innihalda nýttan roknskaparhátt. Nýttur roknskaparháttur skal innihalda viðkomandi upplýsingar um innrokningarhátt og mátigrundarlag sum eru nýtt fyri upphæddirnar í fíggjarjavna, rakstrarroknskapi, notum og møguligari leiðslufrágreiðing. Harundir eisini avskrivingarhátt fyri støðisøgn.
Skráseting Føroya ger viðmerkingar til ársfrásøgina um fíggjarstøða og rakstur ikki samsvara við tað, sum er lýst í nýttum roknskaparhátti, hetta bæði tá ov lítið er lýst og um ov nógv viðurskifti verða lýst í nýttum roknskaparhátti, sum ikki eru viðkomandi fyri ársfrásøgnina.
Í hesum roknskapareftirlitinum gjørdi Skráseting Føroya vegleiðingarskriv til seks feløg sum antin høvdu ov fáar ella ov nógvar upplýsingar í nýttum roknskaparhátti.

**Forklárandi notur** – Skráseting Føroya kom í sambandi við eftirlitið fram á fýra ársfrásagnir, har manglar vóru í notunum. Trý av hesum høvdu ikki upplýst um virksemi felagsins í roknskaparárinum, men bert endurgivið endamál felagsins. Sambært § 76a í ársroknskaparlógini skal felagið lýsa høvuðsvirksemi felagsins í ársfrásøgnini. Hetta í notunum ella í leiðslufrágreiðingini um felagið hevur eina slíka.
Eitt felag hevði ikki upplýst um broytingar í felagskapitali felagsins seinastu 5 árini.

**Manglandi partar av ársfrásøgnini** – Fýra ársfrásagnir høvdu manglar. Í tveimum ársfrásagnum manglaði fundarstjóri á forsíðuni, hesi fingu vegleiðing um at fáa hetta í rættlag í næstu ársfrásøgn felagsins.
Tvær ársfrásagnir vóru ikki grannskoðaðar, hóast feløgini ikki luku treytirnar fyri at velja grannskoðan frá.
Sambært § 135, stk 2 í ársroknskaparlógini kann ein fyritøka í roknskaparflokki B velja grannskoðan frá um fyritøkan fíggjarjavnadagin í tvey fylgjandi roknskaparár ikki fer upp um tvey av fylgjandi støddarmørkum:

1) Ein fíggjarjavna upp á 1 mió. kr.,
2) eina nettosølu upp á 2 mió. kr., og
3) miðaltal gjøgnum roknskaparárið av heiltíðarsettum starvsfólkum upp á 12.

Tað vil siga, at fyritøkan í eitt ár kann fara uppum hesi mørk, um hon tað næsta árið aftur er niðanfyri mørkini. Men fara tølini í fyritøkuni upp um nevndu mørk tvey fylgjandi ár, skal seinna árið grannskoðast.

Feløgini sum ikki luku treytirnar at velja grannskoðan frá, men ikki høvdu latið ársfrásøgnina grannskoðað, vóru biðin um at lata nýggja grannskoðaða ársfrásøgn inn til Skráseting Føroya.

Býtt yvir tey feløg sum høvdu valt grannskoðan frá, fingið roknskaparhjálp og vóru grannskoðaði var býtið av úrslitinum av eftirkannaðu ársfrásagnunum hetta:

| | | Frával<br>7 | Roknskaparhjálp<br>23 | Grannskoðað<br>22 |
|---|---|---|---|---|
| **1.** | **Nýttur roknskaparháttur** | **14%** | **13%** | **9%** |
| **2.** | **Forklárandi notur** | **29%** | **9%** | **0%** |
| **3.** | **Manglandi partar av ársfrásøgnini** | **29%** | **9%** | **0%** |

Skráseting Føroya tók 26 feløg, sum høvdu grannskoðara skrásettan, út til eftirlit. Av hesum vóru 22 ársfrásagnir grannskoðaðar. Prosent tølini í talvuni omanfyri eru gjørd útfrá 22 grannskoðaðum ársfrásagnum. 19 ársfrásagnir vóru settar upp við hjálp frá grannskoðara, umframt tær fýra sum vóru skrásettar við grannskoðara, men ikki vóru grannskoðaðar. Hesar fýra vóru allar settar upp av grannskoðara. Tølini í talvuni omanfyri eru gjørd útfrá, at 23 feløg høvdu fingið roknskaparhjálp. Sjey ársfrásagnir vóru settar upp uttan hjálp frá grannskoðara.

Úrslitið vísti, at av teimum 52 eftirkannaðu feløgunum høvdu ársfrásagnir hjá teimum smærru feløgunum, sum luku treytirnar at velja grannskoðan frá í 13% og 14% av førunum manglar ella ov nógvar upplýsingar í nýttum roknskaparhátti. 22 av teimum eftirkannaðu feløgunum vóru grannskoðaði, og av hesum høvdu tvey - sum er 9%, manglar ella ov nógvar upplýsingar í nýttum roknskaparhátti.

Í samband við forklárandi notur hava 29% av teimum sjey eftirkannaðu feløgunum, sum høvdu frávalt grannskoðan fingið viðmerkingar frá Skráseting Føroya og 9% av eftirkannaðu feløgunum sum høvdu fingið hjálp frá grannskoðara at seta ársfrásøgnina upp. Tað hava í hesum eftirlitinum ikki verið viðmerkingar til forklárandi notur hjá teimum 22 feløgunum, sum høvdu fingið ársfrásøgnina grannskoðaða.

Tær grannskoðaðu ársfrásagnirnar, sum Skráseting Føroya gjøgnumgekk hesuferð, mangla̋ðu ikki partar av ársfrásøgnini. Hetta hendi tó í fleiri førum hjá feløgunum, sum høvdu frávalt grannskoðara. Í hesum eftirlitinum kom Skráseting Føroya fram á, at tvær av ársfrásøgnunum, sum høvdu frávalt grannskoðara, og heldur ikki fingið hjálp frá grannskoðara at seta ársfrásøgnina upp, høvdu manglar, hetta er 29% av úttiknu ársfrásøgnunum. 9% av teimum ársfrásagnunum, sum vóru settar upp við hjálp frá grannskoðara høvdu manglar.

**Fráboðan til Skráseting Føroya manglar** – Í sambandi við eftirlitið kannaði Skráseting Føroya eisini um upplýsingar, sum vóru skrásettir í partafelagsskránni vóru rættar. Harundir til dømis grannskoðaraviðurskifti, viðtøkur og fráboðan um eigarar.
Í 2023/2024 kom Skráseting Føroya fram á átta feløg, sum ikki høvdu øll hesi viðurskiftini í lagi. Fýra viðvíkjandi eigaraviðurskiftum og fýra viðvíkjandi grannskoðaraviðurskiftum.
Fýra feløg høvdu valt grannskoðara frá, men hetta var ikki fráboðað til Skráseting Føroya og tí stóðu tey enn skrásett við grannskoðara í partafelagsskránni.
Eitt av feløgunum hevði enn ikki latið fráboðan um eigarar inn, hóast freistin at lata inn var 1. september 2022. Trý av feløgunum høvdu latið fráboðan um eigarar inn, men hendan samsvaraði ikki við upplýsingarnar, sum vóru í ársfrásøgnini.

**Partaeigaralán** – í sambandi við eftirlitið kom Skráseting Føroya fram á fimm feløg, sum høvdu partaeigaralán. Partaeigaralán er millumrokning ímillum felagið og leiðslu, eigarar ella onnur nærstandandi hjá felagnum. Partaeigaralán eru ólóglig og skulu afturgjaldast við rentum.
Partaeigaralánini, sum Skráseting Føroya kom fram á í sambandi við roknskapareftirlitið hesaferð, vóru í tveimum førum hjá feløgum, sum vóru grannskoðaði og her høvdu grannskoðararnir í báðum førum viðmerkt partaeigaralánini í grannskoðaraátekningini.
Í hinum trimum førunum var talan um ársfrásagnir, sum vóru uppsettar av grannskoðara, og her var upplýst í notu um lánið.
Í øllum fimm førum var partaeigaralánið afturgoldið í árinum.

Niðanfyristandandi talva vísir úrslitið av manglandi fráboðanum og av partaeigaralánum í eftirkannaðu feløgunum:

| | | Ársfrásøgn | í % |
|---|---|---|---|
| **4.** | **Fráboðan til Skráseting Føroya manglar** | **8** | **15%** |
| **5.** | **Partaeigaralán** | **5** | **9%** |

Fleiri feløg vóru ikki skrásett rætt í partafelagsskránni hjá Skráseting Føroya. Úrslitið frá eftirlitinum vísti, at 8 av feløgunum, sum vóru kannaði ikki vóru rætt skrásett, hetta er gott 15% av kannaðu feløgunum. Tað er ábyrgdin hjá leiðsluni í felagnum at fráboða broytingar til Skráseting Føroya.

Skráseting Føroya fekk í sambandi við eftirlitið kunnleika til 5 partaeigaralán, hetta er áleið 10% av kannaðu feløgunum. Partaeigaralánini vóru upplýst í ársfrásagnunum, sum vóru grannskoðaðar og í ársfrásagnunum, sum vóru settar upp av grannskoðara. Einki partaeigaralán var upplýst í ársfrásagnunum, sum høvdu frávalt grannskoðan og heldur ikki vóru settar upp av grannskoðara.

**Samanumtøka**

Í sambandi við roknskapareftirlitið kann Skráseting Føroya vísandi til § 161 í ársroknskaparlógini: 1) vegleiða, 2) átala og 3) krevja, at feilir verða rættaðir.

Í sambandi við eftirlitið av grannskoðaðu ársfrásagnunum hevur Skráseting Føroya valt at vegleiða um viðurskifti hjá tveimum feløgum.

Av feløgunum sum ikki eru grannskoðaði hevur Skráseting Føroya sent vegleiðingarskriv til sjey feløg og biðið um nýggja ársfrásøgn frá tveimum feløgum.

Harumframt hava átta feløg fingið boð um, at tey mangla at senda fráboðan til Skráseting Føroya um broytingar í felagnum. Hetta er viðvíkjandi grannskoðarabroyting og eigaraviðurskiftum.

Umframt stakroyndirnar, hevur Skráseting Føroya í sambandi við móttøkueftirlitið við ársfrásagnum, sum vóru móttiknar í 2023 biðið átta feløg um at lata inn nýggjar ársfrásagnir, tí tær ikki kundu metast at vera ársfrásagnir, sum uppfyltu treytirnar í ársroknskaparlógini. Harav ein sum ikki leyk treytirnar at velja grannskoðara frá. Av hesum vóru sjey íverksetarafeløg og eitt smápartafeløg.

Í mun til móttøkueftirlitið í 2022, tá Skráseting Føroya stovnaði fýra mál viðvíkjandi ólógligum partaeigaralánum, eru eingi mál stovnaði viðvíkjandi partaeigaralánum í móttøkueftirlitinum í 2023.
Skráseting Føroya hevur, afturat vanligu eftirlitunum í 2024, ætlanir um at gera eitt eftirlit fyri seg viðvíkjandi ólógligum partaeigaralánum.